


# Statoil fer at kanna føroysku undirgrundina betri

Deil:

**Jan Müller**

22.08.2014 - 10:26

Oljan.fo

Hóast teir báðir seinastu brunnarnir á føroyska landgrunninum ikki góvu tað úrslit, sum mong høvdu vónað og ynskt, so bendir einki í løtuni á, at Statoil er við at pakka saman og rýma úr Føroyum við tað sama.

Felagið, sum var fyristøðufelag til báðar tær seinastu boringarnar, hevur framvegis fýra leitiloyvi í Føroyum. Fyri at kunna skilja jarðfrøðina enn betur hevur Statoil bílagt ein kanningarpakka fyri einki minni enn 25 mill. kr. frá norskum kanningarfelag. Talan er um at skjóta elektromagnetiska linju frá Súla Stelkur leiðini til Brugdan 2 leiðina og víðari inn

móti Føroyum. Hetta er framhald av kanningum, sum vórðu gjørdar nøkur ár herfyri. Hetta upplýsti felagið í tíðindaskrivi herfyri.

Statoil upplýsti annars í tíðindaskrivi í síðstu viku, at áðrenn felagið tók støðu til, hvussu skuldi farast fram á Føroyaøkinum framyvir, fer felagið at nýta tær nýggjastu upplýsingarnar frá virkseminum í summar sum grundarlag fyri víðari støðutakan. Tað, at felagið nú ger enn meiri kanningar, bendir á, at tað eru fleiri viðurskifti støða skal takast til.

Kanningarnar, sum verða gjørdar av felagnum EMGS Asa, fara fram í heyst og fara at taka 10 dagar. Tað verður við kanningarskipinum BOA Thalassa.



